# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Realskúlanæmingar hittust í 1990



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007.

Myndin er tikin, tá realskúlanæmingarnir hittust til 50 ára hátíðarhald í Hornahúsinum í 1990.

f.v.: Dánjal Magnussen, Karolina Petersen (f. Hansen) Bodil Nielsen (Guttesen) Anna Long (Jacobsen) (Ongland), Poula Christiansen (Jacobsen), Eiler Egholm, Meinhardt Arge, Lisa Næss (Hansen), Inga Wellejus (Juul) (Danmark), Margit við Rætt ( Jacobsen), Ebba Winther (Andreassen), Ella Petersen (Ellendersen) (Kanada), Oda Gaard Olsen (Hansen), Gudny Rubeksen (Jacobsen), Helena Poulsen (Dal-Christiansen) og Oluf Simonsen.

Um onkur hevur hug at ogna sær myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 378).

*Myndaeigari: Helena Poulsen*

Fyri 20 árum síðan:

## Næstan túsund bilskaðar í jólaódnini






Í grein í Sosialinum tann 14. januar 1989 stendur at næstan 1000 bilar fingu skaða í jólaódnini 21. og 22. desember 1988.

Fleiri bilar gjørdust vrak. Ein bilur í Hvalba var fullkomiliga horvin, hann var helst fokin á sjógv.

Við teimum nógvu skaðunum beint fyri jól kom samlaða talið av bilskaðum upp um 6.000 í 1988.

Hetta gav sum vera man nógv arbeiði til bilverkstøðini og sýnsmenninar hjá Tryggingarsambandinum Føroyar.

### Dagurin

**15. januar. Maurus**, deyður umleið ár 550. Var næmingur hjá tí mæta kleysturhøvdinga Benedikti úr Nursia, og fylgdi honum eftir sum abbati. Navnið merkir *blámaður*.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

### Andlát og jarðarferðir

**John (Jonn) Egholm**, Vestmanna, andaðist týsdagin, 78 ára gamal.

**John Frederick Holland**, vanliga nevndur Fred, ættaður úr Biringham í Onglandi, giftur við Kitty Jacobsen av Glyvrum, búsitandi í Leirvík, andaðist týsdagin, 89 ára gamal.

**Nina Magnussen** fer til gravar úr Hørsholm Kirke, fríggjadagin 16. januar kl. 12.00. Tey, sum vilja minnast Ninu, kunnu lata føroya cystisk fibrosa felag eina peningagávu, konto í Føroya Banka, nummar 6460-4008938

**Esther Nielsen**, fødd Petersen, ættað úr Norðragøtu, búsitandi í Gammel Holte, andaðist sunnukvøldið á Herlev Sjúkrahúsi, 77 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Gammel Holte-kirkju leygardagin kl. 13.

**Olivar Reinert** úr Syðradali, búsitandi í Sorø, andaðist á Slagelse sjúkrahúsið mánadagin 12. januar, 68 ára gamal.

### Jarðarferð

**Olivar Reinert**
úr Syðradali

fer til gravar úr Kaldbaks kirkju leygardagin kl. 12.00.

*Vegna tey avvarðandi*

Tey, ið vilja minnast Olivar, kunnu lata Hjartafelagnum eina peningagávu.

### Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá bróðir, pápabeiggi og abbabeiggi okkara

**Sjúrður á Kósini**
lærari

andaðist og varð jarðaður.
Takk til prest og øll tykkum, sum komu við góðum og troystarríkum orðum.
Takk til Klaksvíkar sjúkrahús og Sjúklingaheimið Tórshavn.
Takk øll somul, sum vóru so góð við Sjúrða, serliga hesa seinastu sváru tíð.
Vit takka teimum, sum hjálptu okkum í sambandi við jarðarferðina, og øllum tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Hans Jacob við familju**